52-052/2021

LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister's Office

Løgtingið

Svar
uppá

skrivligan fyrispurning nr. 52/2021 eftir tingskipanini § 52a til Bárð á Steig Nielsen, løgmann, frá Høgna Hoydal, løgtingsmanni, um undirskrivaða avtalu við Danmark og Grønland um uttanríkis-, verju- og trygdarpolitikk

Fyrispurningurin var soljóðandi:

1. Við hvørjari heimild hevur løgmaður undirskrivað eina avtalu við donsku og grønlendsku stjórnina um at viðgera uttanríkispolitikk, verju-, og trygdarpolitikk í einum ráði við donskum, føroyskum og grønlendskum ráðharrum?

2. Við hvørjari heimild hevur løgmaður skrivað undir avtalu, har eisini yvirtikin málsøki skulu viðgerast í einum slíkum ráði?

3. Nær hevur løgmaður verið til ráðførslu í Uttanlandsnevnd Løgtingsins um hesa avtalu sambært løgtingslóg um stýrisskipan Føroya §54?

4. Um ikki, er hetta tá í samsvari við løgtingslóg um stýrisskipan Føroya?

Svar:

Spurningarnir verða svaraðir undir einum.

Heimildin hjá Føroya landsstýri at stovna samstarvsráðið er tvíbýtt. Sum útinnandi vald hevur landsstýrið heimild í stýrisskipanarlógini § 1, og heimildin at umboða Føroyar mótvegis ríkismyndugleikunum er at finna í § 51 í somu lóg.

Samstarvsráðið er stovnað, tí tørvur er á sterkari samstarvi og betri samskipan á uttanríkis-, trygdar- og verjupolitiska økinum. Umboðini í samstarvsráðnum eru ráðharrar og landsstýrisfólk úr Danmark, Grønlandi og Føroyum. Grundarlagið fyri, hvussu samstarvsráðið er mannað, er at finna í málsøkjabýtinum í teimum ymisku londunum. Føstu umboðini fyri Landsstýrið eru í løtuni:

- Løgmaður, sum umframt at vera stjórnarleiðari, umsitur yvirtøkumál og yvirskipaðu viðurskifti Føroya mótvegis Danmark.
- Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, umsitur málsøkið nettrygd.
- Landsstýrismaðurin í uttanríkis- og mentamálum, ið umsitur uttanríkis-, trygdar- og verjumál.

Tinganes · FO-100 Tórshavn · Faroe Islands
Tel. +298 306000 · Fax +298 306015 · info@tinganes.fo · www.tinganes.fo

52-052/2021

Kommissoriumið fyri uttanríkis-, trygdar- og verjupolitiska samstarvssráðið, ið ásetur karmarnar fyri samstarvið, varð undirskrivað og almannakunngjørt tann 4. oktober 2021. Í tí sæst, at í samstarvsráðnum verða ongar uttanríkis-, trygdar- og verjupolitiskar avgerðir tiknar.

Samstarvsráðið er hinvegin ein pallur, har umboð fyri Danmark, Føroyar og Grønland umrøða, kunna og kjakast um ymisk uttanríkis-, trygdar- og verjupolitisk mál. Eisini um yvirtikin málsøki, sum kunnu hava ein uttanríkis-, trygdar- og verjupolitiskan dám.

Í Tinganesi, 18. oktober 2021

Bárður á Steig Nielsen
løgmaður